

*Gudrun og Oddmar náddu at halda 10 ára brúdleypsdag summarið áðrenn Gudrun doyði í flogvanlukkuni. Nú býr Oddmar sjálvur við synunum í húsinum í Sandavági.*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

koyrdu til Stord. Tey sóu illa farna flogfarið og stongdu hurðina, ið var munurin millum lív og deyða umborð á Flight 670.

At flúgva til Noregs bara dagar eftir vanlukkuna var eingin trupulleiki hjá Oddmari. Hann hevur ongantíð verið bangin at flúgva, og hendingin í Stord ávirkaði ikki tað.

Heim við úr Noregi høvdu tey kistuna við Guðrun. Hon var jarðað dagin eftir og fylgið var ómetaliga stórt.

## Synirnir sakna mammuna

Oddmar heldur ikki, at tað er nakar serligur munur á, hvussu fólk vóru móti honum fyri og eftir vanlukkuna í Stord. Einasta hending, hann minnist, er ein maður, ið kom yvir til hansara í einum handli í Sandavági og byrjaði at prædika um, at tað er ein meining við øllum.

> Hvar er meiningin við, at tveir smádreingir skulu missa mammu sína?

– Tað helt eg verða langt úti. Hvar er meiningin við, at tveir smádreingir missa mammu sína?

Fyrstu tvey árini aftaná arbeiddi Oddmar ikki. Tíðin fór til at taka sær av synunum. Nú arbeiðir hann fyrrapartar sum húsavørður, meðan synirnir eru í skúla.

Hann hevur nógv fólk rundanum seg, bæði í Bø og í Sandavági, men helst vil hann klára seg sjálvan. Nakra nýggja konu hevur hann ikki funnið sær, og hvar tíðin skuldi verið til tað, veit hann ikki. Hann hevur nokk at gera við at taka sær av húsi og børnum.

Synirnir hava tað rímuliga gott. Teir sakna mammu sína sera nógv, og Oddmar fær tár í eyguni, tá hann greiður frá. Hann tosar við teir um Guðruna, men eftirsum teir gerast so keddir, roynir hann at avmarka tað eitt sindur.

## Gjørdi sjálvur gravsteinin

Oddmar hevur lætt bæði til látur og grát. Hann flennir at onkrum minni um Guðruna og vísir mær myndina, ið var tikin, tá tey høvdu 10 ára brúðleypsdag summarið 2006, bert mánaðir áðrenn Guðrun var rykt frá teimum.

Eitt av støðunum, sum Oddmar og Guðrun vid synunum ofta vitjaðu, var úti á endanum av Sørvágsvatni, við Bøðsdalafoss. Tey høvdu kaffi við og hugnaðu sær óført. Tá Oddmar sjálvur fór út har, aftaná at Guðrun var deyð, fann hann ein stóran stein, sum hann avgjørdi skuldi verða gravsteinurin hjá Guðrun.

Hann greiður flennandi frá stríðnum at fáa steinin til húsar, men við eini militerbøru og góðari hjálp eydnaðist tað honum. Steinin vildi hann hava til eitt ára dagin eftir vanlukkuna. Hann skrúvaði sjálvur bókstavirnar á, og steinurin stendur nú vakur í kirkjugarðinum í Sandavági.

Vit enda samrøðuna í kirkjugarðinum. Grøvin er væl hildin og fleiri postalínseinglar, fuglar og rósur liggja á grøvini. Oddmar veit ikki, hvaðani nógv av tingunum eru komin. Tað eru helst fólk, ið vitja grøvina, sum hava lagt tingini.

Hann rættar eitt sindur uppá eina blómu og lesir síðani, tað sum stendur á gravsteininum:

– Her hvílur góða kona og mamma okkara Guðrun H. Joensen – Takk fyri alt.